## Nýggjar løgtingsnevndir

Á tingfundi fríggjadagin valdi Føroya Løgting nýggjar løgtingsnevndir eftir valið 30. apríl. Tað tók drúgva tíð hjá landsins kosnu at telva allar sessirnar upp á pláss. Eisini var trupult at seta nøvn á.

Endin gjørdist, at andstøðan fekk formanssessirnar í vinnu- og trivnaðarnevndini. Hinar nevndirnar eigur ein úr samgongu sum formann.

Endaliga býtið gjørdist hetta.



*Óli Breckmann er nú formaður fyri hina størstu løgtingsnevndina, fíggjarnevndin*

**Fíggjarnevndin**
Fastir limir:
Óli Breckmann (form.)
Kári P. Højgaard
Kristina Háfoss
Tórbjørn Jacobsen
Lisbeth L. Petersen
Johan Dahl
Vilhelm Johannesen

varalimir:
Jógvan við Keldu
Poul Michelsen
Jógvan Arge
Páll á Reynatúgvu
Alfred Olsen
Kaj Leo Johannesen
Henrik Old



*Hergeir: Hergeir Nielsen gjørdist ikki løgtingsformaður. Ístaðin gjørdist hann formaður fyri uttanlandsnevndina*

**Uttanlandsnevndin**
Fastir limir:
Hergeir Nielsen (form.)
Jógvan við Keldu
Jógvan á Lakjuni
Jenis av Rana
Johan Dahl
Jóannes Eidesgaard
Katrin Dahl Jakobsen

Varalimir:
Niklái Petersen
Jóanis Nielsen
Heðin Zachariasen
Heini O: Heinesen
Heðin Mortensen
Andrias Petersen
Henrik Old



*Heini O. Heinesen er ikki longur formaður fyri vinnunevndina, men tað rakk til ein formanssess í landsstýrismálanevndini*

**Landsstýrismálanevndin**
Fastir limir:
Heini O. Heinesen (form.)
Jákup Mikkelsen
Kaj Leo Johannesen

Varalimir:
Niklái Petersen
Heðin Zachariasen
Lisbeth L. Petersen



*Henrik Old kann næstu tvey árini kalla seg formann fyri vinnunevndina. Eftir tvey ár tekur ein sambandsmaður við*

**Vinnunevndin**
Fastir limir:
Henrik Old (form.)
Heini O. Heinesen
Tórbjørn Jacobsen
Heðin Zachariasen
Alfred Olsen
Kaj Leo Johannesen
Gerhard Lognberg

Varalimir:
Annita á Fríðriksmørk
Niklái Petersen
Poul Michelsen
Johan Dahl
Bárður Nielsen
Katrin Dahl Jakobsen
Vilhelm Johannesen



*Jógvan á Lakjuni hevur skift formanssessin í mentanarnevndini út við formanssessin í rættarnevndini*

**Rættarnevndin**
Fastir limir:
Jógvan á Lakjuni (form.)
Poul Michelsen
Jógvan Arge
Niklái Petersen
Bárður Nielsen
Johan Dahl
Kristian Magnussen

Varalimir:
Jóanis Nielsen
Jógvan við Keldu
Heini O. Heinesen
Páll á Reynatúgvu
Alfred Olsen
Heðin Mortensen
Jóannes Eidesgaard



*Alfred Olsen situr somuleiðis sum formaður í tvey ár, áðrenn ein javnaðartingmaður kemur ístaðin*

**Trivnaðarnevndin**
Fastir limir:
Alfred Olsen (form.)
Jóanis Nielsen
Jenis av Rana
Páll á Reynatúgvu
Marjus Dam
Kristian Magnussen
Andrias Petersen

Varalimir:
Óli Breckmann
Heini O. Heinesen
Jógvan Arge
Kaj Leo Johannesen
Heðin Mortensen
Katrin Dahl Jakobsen
Gerhard Lognberg



*Næstu fýra árini kann Annita á Fríðriksmørk kalla seg formann fyri mentanarnevndini hjá løgtinginum*

**Mentanarnevndin**
Fastir limir:
Annita á Fríðriksmørk (form.)
Jógvan Arge
Jákup Mikkelsen
Kári P. Højgaard
Heðin Mortensen
Katrin Dahl Jakobsen
Andrias Petersen

Varalimir:
Tórbjørn Jacobsen
Kristina Háfoss
Jógvan á Lakjuni
Jóanis Nielsen
Marjus Dam
Gerhard Lognberg
Kristian Magnussen

Lisbeth L. Petersen:

# Fullveldi fastfryst

**– Samgonguskjalið er staðfestingin av, at løgmaður ongantíð ætlaði at taka okkum upp í eina samgongu. Í høvuðsheitum kundu vit tikið undir við tí mesta av samgonguskjalinum, sigur Lisbeth L. Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Sambandsflokkurin gjørdist stóri sigursharrin við valið 30. apríl, men kortini endaði flokkurin aftur í andstøðu.

Hetta er Lisbeth L. Petersen, forkvinna fyri Sambandsflokkin, als ikki nøgd við.

– Vit eru kedd um, at vit ikki komu í samgongu, men veljararnir hjá okkum hava ávirkað samgonguna, og hetta fegnast vit um, sigur Lisbeth L. Petersen, tá vit ringdu hana upp eftir viðmerkingum til samgonguskjalið, sum varð undirskrivað í dag, týsdagin.

Hon vísir við hesum á, at samgongan við hesum samgonguskjalinum hevur lagt á annan bógv í fullveldismálinum.

– Fullveldi er lagt á ís næstu fýra árini, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hon heldur, at tað ongantíð var ætlanin, at Sambandsflokkurin skuldi gerast partur av einari komandi samgongu.

– Samgonguskjalið er staðfestingin av, at løgmaður ongantíð ætlaði at taka okkum upp í eina samgongu, sigur Lisbeth L. Petersen, sum ikki heldur, at nakrar av umberingunum hjá løgmanni kunnu góðtakast.

Hon vísir eisini á, at tað í valstríðnum varð gjørt til eina fólkaatkvøðu um fullveldi, men hetta verður sett til síðis nú.

– Teir venda og snara øllum, sigur Lisbeth.

### Samd, ósamd

– Í høvuðsheitum kundu vit tikið undir við tí mesta av samgonguskjalinum, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hon sigur, at samgonguskjalið nógvastaðni er merkt av leysum orðingum. Eisini eru fleirir orðingar, ið øll kunnu taka undir.

– Teir hava fingið ein hvøkk. Teir hava steðgað førda politikkinum. Hetta hava veljararnir hjá okkum víst teimum á, sigur Lisbeth.

Fleiri orðingar í samgonguskjalinum kennir hon eisini aftur frá teirra fundum við løgmann og frá valstríðnum. Hon heldur eisini, at tað er ógvuliga lítið konkret skrivað nógvastaðni.

Hóast Sambandsflokkurin í høvuðsheitum kundi tikið undir við samgonguskjalinum, so merkir hetta ikki, at flokkurin er samdur við øllum.

Lisbeth L. Petersen sigur, at flokkur hennara ikki vildi ganga við til, at arbeiðið við at yvirtaka løgreglu og rættarskipan skuldi halda fram, ið nú stendur í samgongskjalinum. Heldur ikki gekk Sambandsflokkurin við til, at blokkurin skuldi fastfrystast, soleiðis sum tað nú er stungið út í kortið.

Lisbeth L. Petersen heldur ikki, at tað rennur væl saman, tá samgongan ynskir at gera almennu umsitingina ódýrari og at eitt stýri verður sett afturat.

### Fólka- og Miðflokkurin

Tá vit spyrja hana eftir, hvør flokkur serliga merkir hetta nýggja samgonguskjalið, so heldur Lisbeth L. Petersen, at tað sæst lítið til Tjóðveldisflokkin, men kanska meira til Fólkaflokkin og Miðflokkin.

Í samgonguskjalinum setir samgongan sær sum mál at yvirtaka eina longri røð av sokallaum smærri málsøkjum. Hetta roknar Lisbeth tó ikki við, at teir fara at klára.

– Tað er eitt risastórt arbeiði í hesum. Teir hava eisini sett sær nógv og stór mál áður, men tað hevur ikki borið til, og tað fer tað heldur ikki hesaferð, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hóast fullveldi nú er lagt á ís, so roknar forkvinna Sambandsfloksins við, at Tjóðveldisflokkurin eigur okkurt annað í skjáttuni.

– Vit hava eina sterka andstøðu, sum fer at arbeiða væl saman, sigur Lisbeth L. Petersen at enda, nú líkt er til, at fara at verða fýra ár í andstøðu í parti við Javnaðarflokkinum.



# Løgmaður leyp upp um har garðurin var lægstur

**– Tað kann ikki vera av politiskum orsøkum, at javnaðarflokkurin varð útihýstur frá at koma í samgongu, sigur Jóannes Eidesgaard**

SAMGONGU-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Annfinn Kallsberg læt hurðina aftur fyri javnaðarflokkinum og valdi heldur tað loysnina tá ið hann skipaði nýggja samgongu, sigur Jóannes Eidesgaard*

– Tá ið Annfinn Kallsberg skipaði nýggja samgongu, leyp hann uppum, har garðurin var lægstur.

Tað sigur Jóannes Eidesgaard um tað nýggju samgonguna, sum nú er skipað.

Eftir at hava lisið samgonguskjalið, staðfestir hann at hóast nógv ivamál eru, kann ikki vera av politiskum orsøkum, at javnaðarflokkurin ikki fekk høvi at gerast ein partur av samgonguni.

Sum hann vísir á í aðrari grein, kann javnaðarflokkurin taka undir við stórum parti av samgonguskjalinum, var tað umskrivað og polerað eitt sindur á summum økjum.

– Tað er áhugavert at staðfesta, at tær forðingar sum lógu í vegin fyri eini samgongu við javnaðarflokkin, ikki longur liggja í vegin fyri eini samgongu við miðflokkin, sigur floksformaðurin.

### Var bara lótir

Er orsøkin til, at tit ikki eru við í samgonguni í botn og grund ikki tann, at javnaðarflokkurin er vorðin so sambandssinnaður, at ber ikki til at koma nakran veg á sjálvstýrisleið?

– Nei, tað haldi eg ikki, tí poltiskt er tað ikki so nógv sum skilir, at tað ikki kundi borið til, bara viljin var til staðar. Men tað, sum er farið fram, er hinvegin prógv um, at Anfinn Kallsberg ongantíð hevur meint nakað við tað, sum hann ferð eftir ferð hevur ført fram, um, at hann vildi hava eina breiða samgongu.

– Nú eru 33 dagar farnir síðani valið, men av allari hesari tíðini, hevur hann bara brúkt fýra dagar upp á samráðingar við javnaðarflokkin um eina breiða samgongu, hann sigur seg hava sóknast eftir alla tíðina.

– Sostatt mugu vit staðfesta, at maktin er blivin eitt endamál í sær sjálvum og tað er eitt afturstig fyri fólkaræðið.

– Hann hevur eisini beinleiðis sagt, at hansara uppgáva er at seta fólkaflokkin í eina so góða støðu sum gjørligt.

– Hetta vísir, at løgmaður misskilir, ella mistulkar, embætið sum løgmaður.

Hinvegin heldur formaður javnaðarfloksins kortini, at tað er ikki meiri enn rímiligt, at somu flokkar, sum skóru 366 milliónir av ríkisveitingini úr Danmark, sleppa at halda fram, so at teir eisini sleppa at merkja sviðan av minkandi inntøkuni, ístaðin fyri at turka upptakið upp í onkran annan.

### Valdu lættastu loysnina

Formaður javnaðarfloksins heldur eisini, at við at taka miðflokkin upp í samgonguna, hevur løgmaður heilt einfalt lopið upp um, har garðurin varð lægstur.

– Tað hevur verið lættari hjá samgonguni at adoptera miðflokkin og so bara lata hann yvirtaka onkur av teimum málsøkjum, sum sjálvstýrisflokkurin natúrliga misti, heldur enn at samráðast seg til eina heilt aðra samgongu við ein sterkan flokk, sum javnaðarflokkin, ið fór at seta krøv og sum eisini hevði kravt, at málsøkini blivu býtt sundur ímillum flokkarnar heilt av nýggjum.

– Tað er týðiligt, at ein samgonga við javnaðarflokkin hevur ongantíð verið tað, sum fólkaflokkurin og tjóðveldisflokkurin vildi hava.

– Sostatt er tað ikki javnaðarflokkurin sum hevur telvað so illa, at hann útihýsti seg sjálvan. Tað var ongantíð meiningin, at vit skuldu uppí.

### Lítið hugaligt

Jóannes Eidesgaard dylir ikki fyri, at tað verður lítið hugaligt at fara aftur í andstøðu.

– Men tíverrigjørdi løgmaður heldur av at halda fram við tí sama politikkinum, ið hevur kloyvt landið í tveir partar, ístaðin fyri at brúka tann søguliga møguleikan hann hevði at ein stóran part av løgtinginum og føroya fólki um ein og sama politikk.

– Nú javnaðarflokkurin fer í andstøðu, er tað so ikki vandi fyri, at hann smeltar saman við sambandsflokkin og at sambandsflokkurin fer at eta burturav javnaðarflokkinum.

– Jú, tað er altíð ein vandi. Men okkara fremsta uppgávan verður at føra andstøðupolitikk sum ein sjálvstøðugur flokkur, tí hóast vit eru í andstøðu við sambandsflokkinum, merkir tað ikki, at vit altíð skulu hava somu støðu, verri enn so. Vit fara altíð at vera okkara egni í andstøðu- og vit eru framvegis einasti flokkur í Føroyum vinstrumegin miðjuna og tað støðuna fara vit at varðveita, tí tað hevur føroyski veljarin sanniliga brúk fyri.

Heldur hendan samgongan alt valskeiðið, hevur javnaðarflokkurin verið í andstøðu í samfull 10 ár út í eitt og tað er ikki hent fyrr síðani heimastýrislógina.

Men tað fer ikki formannin í javnaðarflokkinum at umhugsa sína støðu í flokkinum.

– Eg haldi ikki, at vit, ella eg sjálvur, kundi gjørt so nógv við støðuna, tí tað, sum hendi, var, at Anfinn Kallsberg gjørdi av at tvíhalda um maktina og útihýsti øllum øðrum.

– Men tað er greitt, at hetta gevur orsøki til sjálvrannsakan fyri at vita, hvussu vit kunnu styrkja flokkin til at brynja segt út til framtíðar avbjóðingar, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Men vit mugu eisini taka okkara stýrisskipanarlógina til eftirmetingar, tí tað, vit hava upplivað síðani valið er, at vit hava ikki kunna fingið fríar samráðingar í lagm, tí Anfinn Kallsberg kundi seta seg á valdið og seta allar treytirnar og tað eigur ikki at henda aftur, leggur Jòannes Eidesgaard afturat.

# Óneyðugt at vit skiltust upp á hetta

**– Samgonguskjalið liggur á nógvum økjum innanfyri tað, sum javnaðarflokkurin kundi góðtikið, eisini á ríkisrættarliga økinum, sigur Jóannes Eidesgaard**

SAMGONGUSKJALIÐ
*Áki Bertholdsen*



*– Á ríkisrættarliga økinum, liggur samgonguskjalið innanfyri tað, sum javnaðarflokkurin stórt sæð kundi góðtikið, so politikkur er ikki orsøkin til, at flokkurin varð útihýstur frá samgonguni, sigur Jóannes Eidesgaard*

– Samgonguskjalið, sum nú er gjørt ímillum fólkaflokkin, sjálvstýrisflokkin, tjóðveldisflokkin og miðflokkin, liggur á fleiri økjum, innanfyri tað, sum javnaðarflokkurin kundi góðtikið. Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins, sigur, at tað er ikki samgonguskjalið, sum forðaði javnaðarflokkinum at vera við í eini breiðari samgongu, sum Anfinn Kallsberg ferð eftir ferð sigur, at hann hevur sóknast eftir.

– Við ávísum umskrivingum og poleringum, kundi javnaðarflokkurin góðtikið ein stóran part av samgonguskjalinum . Og vit mugu eisini staðfesta, at ein partur av samgonguskjalinum er meiri og minni skrivað av eftir valskránni hjá javnaðarflokkinum, eitt nú ætlaninar hjá samgonguni á eldraøkinum, heilsuøkinum, fiskivinnuøkinum og eisini hvat økismenning viðvíkur.

– Somuleiðis kunnu vit staðfesta, at eisini á ríkisrættarliga økinum, liggur samgonguskjalið innanfyri tað, sum javnaðarflokkurin stórt sæð kundi góðtikið.

### Leysar orðingar

Hóast javnaðarflokkurin kundi tikið við stórum pørtum av samgonguskjalinum, leggur formaðurin dent á, at nógvar orðingar eru so leysar, at tað ber ikki til at fáa at vita, hvat liggur aftanfyri.

Fyri suðuroyingar hevur tað áhuga, at tunnilin ímillum Øravík og Hov er ikki nevndur, men nýggjur studentaskúli í Havn er nevndur. Samferðsluhavn á Tvøroyri er ikki nevnd, men nýggur tekniskur skúli í Havn er nevndur, samstundis sum hølistrupulleikarnir hjá HT útbygginini í Klaksvík verða umrøddar.

– Men, hvat merkir tað, at landbúnaðarpolitikkurin skal endurskoðast? er tað sama privatiseringsætlan, sum hevur verið frammi?

– Hvat merkir tað, at kommunulæknaskipanin skal endurnýggjast við atliti at læknatrotið?

– Og hvat merkir tað at arbeiðast skal fyri at gera eina skipan, sum kann loysa trætur á arbeiðsmarknaðinum so skjótt, tær koma í. Merkir tað, at okkurt slag av arbeiðsrætti skal skipast, spyr javnaðarflokkurin.

Hann spyr eisini, hvat tað er fyri ein eftirlønarskipan, sum ætlanin er at seta í verk? er tað tann ósolidariska skipan, sum arbeitt hevur verið við? Samstundis tykist um um ætlanin er at sleppa øllum almennum virksemi í oljuvinnuni.

Men hann leggur áherðslu á, at fyrrenn greiða er fingin á, hvat liggur aftanfyri tær leysu orðingarnar, ber ikki til at siga við vissu, í hvønn mun javnaðarflokkurin hevði kunnað tikið undir við samgonguskjalinum.

### Snaring til høgru

Samstundis vísir formaður javnaðarfloksins, at eftir samgonguskjalinum, fara Føroyar at snara til høgru tey komandu árini, tí í samgonguskjalinum er eisini ein røð av borgarligum tiltøkum.

– Tosað verður nógv um privatiseringar og at selja almennar ognir til hægstbjóðandi og tað merkir væl, at tær eisini skulu bjóðast út uttanlands.

Samstundis skulu tænastur hjá Strandferðsluni bjóðast út.

– Harafturat má staðfestast korini hjá teimum tímaløntu vera valla tikin upp á tunguna í nýggja samgonguskjalinum.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað hóvar ikki javnaðarflokkinum at geva ov leysar teymar á hesum øki. Og hann leggur eisini dent á, at øll ivamálini, sum eru í samgonguskjalinum, gera, at enn er ov tíðliga at siga, hvussu javnaðarflokkurin fer at fyrihalda sær í Løgtinginum.

– Men vit fara at føra ein konstruktivan andstøðupolitikk, har vit fara at geva samgonguni eitt munadygt mótspæl og har vit fara at taka undir við teimum málum, vit halda vera skilagóð, men har vit fara at átala, har ið tað gongur skeiva vegin, eftir okkara tykki, sigur Jóannes Eidesgaard.